gult cyan magenta svart

Í havsins djúp og grunnar

Úr havsins d‡pi, har bert fá sleppa at kaga inn, eru nú komnir teir fyrstu lutirnir av Sauternes. Jólaskipinum, sum sakk í Fugloyarfir›i 7. december 1941

Teir fegnast um fongin

Or› og myndir:
Edvard Joensen

F‡ra ymiskar lutir í fimm pørtum fingu kavararnir upp av Jólaskipinum mikudagin. Maskintelegrafurin á brúnni var í tveimum pørtum. Fóturin til ein annan telegraf, ró›urstamman og eitt kúgveyga vóru teir lutir, sum fingnir vór›u upp av havsins botni á hesum túrinum.

Danska kavarali›i›, sum komi› er hendanvegin at kava eftir lutum frá Jólaskipinum, telur fimm mans. Hesir eru servandir til at kava á djúpum vatni. Og ta› krevst serlig venjing til at fara heilt ni›ur á 100 metra d‡pi. Tí fari› ver›ur skjótt ni›ur, me›an spakuliga ver›ur komi› uppaftur. Hetta er gjørligt vi› útjavning av tr‡stinum ávegis. Ni›ur má ganga skjótt, me›an lagaligari ver›ur bori› at á veg uppaftur.

Mikudagin barst tí eina dananum frá, so teir noyddust at broyta løgdu ætlanina eitt sindur. Men samanlagt gjørdist úrsliti› so miki› gott, at einki var› klaga›, tá li›ugt var, kortini.

Spennandi

Í bygdarhúsinum í Hvannasundi, har kavarali›i› b‡r, er spenningurin mestsum til at taka í mikumorgunin. Fólk er á gongd. Kavararnir og hjálparfólk teirra eru úttørna›. Soviposar liggja á madrassum á gólvinum. Onkur situr og lesur blø›ini, sum komin eru í morgun. Onkur fær sær ein bita. Ein er farin út at fáa hendur á nøkrum kaffipakkum, tí nú var gingi› undan, og ikki ber til at fara ein heilan dag á flot uttan kaffi.

Ein flokkur av pressufólki er komin og tro›kast inn í tann framman undan væl manna›a køkin. Tosa› og skemta› ver›ur og mali› aftur og fram.

Kyrrindi eru í Fugloyarfir›i klokkan 11.39 hendan dagin. Farast skal frá landi í so miki› gó›ari tí›, at klárt er at fara ni›ur á sjálvum kyrrindunum, so tá klokkan er farin gott og væl av níggju, ver›ur fari› yvir á brúnna í Nor›depli, ha›ani siglt ver›ur.

Brunnbáturin Dragaberg, sum virka› hevur sum kavaraskip hjá »ekspeditiónini«, kemur flaggskr‡ddur nor›ur gjøgnum Hvannasund.

Ingi, skiparin, hevur gjørt seg út til, at í dag skal ta› ver›a. Hann hevur hongt vimplar og skelti hjá teimum, sum peningaliga hava stu›la› tiltakinum, í mastrar og antennur. Merki› veittrar, sum vera man, eisini yvir Dragabergi hendan morgunin.

Vi› gó›ur treysti fara fólk at skipa inn. Nógv er útger›in. Fløskur og onnur kavaraútger›. Klæ›i, proviantur, fotoútger› og so framvegis. Tveir gummibátar skulu eisini vi›. Teir ver›a hongdir afturút.

Men so eru ta› ve›urlíkindini og ikki minst alduhæddin. Spennandi er, hvussu her fer at roynast. Líkindini her innansyndist tykjast vera í lagi, men ta› er nú ikki her, kavast skal.

Og Ingi, skiparin, sum komin er uttan av havi í morgun, letur einki at solei›is. Hann heldur alduna vera í so høga, men vil einki útiloka kortini.

So ver›ur fari›. Su›ur gjøgnum Hvannasund, runda Sundaberg og nor›ur gjøgnum Svínoyarfjør›.

Ingi hevur einki álit á skadduni, sum hongur ni›ur yvir Havnartind. Hon kann fara at geva trupulleikar seinni, óttast hann fyri. Hon plagar at gera vind, grei›ir hann frá.

Me›an siglt ver›ur, ver›ur tosa› um, um nú boyan, sum løgd er at merkja vraki›, man liggja har, hon var løgd. Fyrr er hent, at hon hevur sliti›, og so mátti leitast aftur. Hóast Ingi hevur neyvu positiónina inni á plottararnum, er ikki bara sum at siga ta› at raka snórabeint, tá kava› ver›ur á stórum d‡pi. Tá er ein standari gó›ur at lesa seg ni›ur eftir.

Sum vit koma nor›ureftir, ver›ur dúgliga hugt at radaranum fyri at vita, um eitt útslag man fara at vísa seg.

Jú, nú var hon har, og ta› lætti hjá fleiri, at hesin trupulleikin ikki skuldi vera, at leitast mátti av n‡ggjum.

So flotnar

Spenningurin veksur, sum menninir eru farnir at gera klárt at kava. Fólk er fari› í bá›ar gummibátarnar, sum skulu liggja hjá boyuni. Einir tveir hjálparkavarar gera seg eisini klárar.

Annar skal liggja í sjónum hjá boyuni og vera djúpvatnskavarunum til hjálpar, tá teir koma longri upp aftur í sjógvin. Hin skal vera klárur at gera fast á ta›, sum teir helst fara at senda upp av botni vi› ballónum.

Teir kava, og so er bara at bí›a, til eitthvørt fer at henda. Og ta› er ikki leingi at bí›a, so støkkur ein rey› boya langt upp úr sjónum, og róp kemur í. Hatta var tann fyrsta, sum teir sendu upp.

Men okkurt var ikki heilt í lagi, tí boyan minka›i í so skjótt, og tók at tyngjast hóttandi í sjónum. Men teir í gummibátunum vóru klárir og fingu hendur á boyuni og tóku inn ta›, sum hongt var í.

Ta› var maskintelegrafurin.

Seinasta boyan er komin upp og teir hava gjørt fast á hana

Teir gera klárt at kava

Lagt var› at Dragabergi, og fongurin fingin umbor›. Og hetta var dagur í viku. Hurrarópini geltu, og menn slerdur hendur saman í ovfarakæti, nú fyrstu lutirnir, sum longst hev›i veri› eftir, vóru komnir undan kavi.

Men nú var ikki at bí›a, tí nú gekk skjótt. Ta› kom heilt skjótt ein boya aftrat sendandi vi› nógvari fer› upp gjøgnum sjógvin. Ró›urstamman. Og frøin og spenningurin vuksu.

Spenningurin, tí nú var› bí›a eftir eini stálkurv, teir høvdu at fylla í slíkt, teir funnu á botni.

So var eitt øgiligt sprutt og ein blástur sum frá einum stórhvali, tá ein stór, gul boya kom sendandi sjóleys naka› frá skipinum. Gummibátur og kavari vóru á henni beinanvegin, tí her kundi vera tann størsti fongurin í. Satt at siga gingu menn vi› eini stillari vón um, at teir fóru at finna skipsklokkuna og fáa hana upp vi› kurvini.

So var kortini ikki. Men heilt sørt var tó ikki. Ein fótur til ein annan maskintelegraf og eitt kúgveyga av skipinum vóru í kurvini.

Tá alt var komi› á dekki› á Dragabergi, var bara at hava tol. Nú fóru at ganga einir tveir tímar, til kavararnir komu upp.

Teir mugu nevniliga ansa sera væl eftir ikki at koma ov skjótt upp av so stórum d‡pi. Ta› er beinlei›is lívshættisligt.

Teir hava merkt sær standaran vi› ávísum millumrúmum, sum teir so ste›ga vi›, so hvørt tí› er. Og professionellir sum teir eru, gekk hetta bara heilt væl.

Her er ta›, alduhæddin er so umrá›andi. Tí ta› er sera tungt at hanga í einum enda einasta›ni í mi›um sjógvi, me›an streymurin alla tí›ina vil fara avsta› vi› tær. Tí er umrá›andi, at rímiliga fri›aligt eisini er upp og ni›ur.

Bí›a› var› í spenningi fyri at vita, um teir kanska høvdu onkran lut uppi á sær, tá teir komu. Men so var ikki.

Tó so, teir høvdu funni› ein bor›isk, sum teir høvdu tiki›, men vóru so óhepnir, at teir mistu hann, me›an teir ste›ga›u á einasta›ni á veg upp.

Slíkt hendir, og ver›ur bara tiki› vi› í ætlanina sum ta›, ta› er, seg›i verkætlanarlei›arin og ypti øksl.

Dreymurin

Hetta var bara dreymurin, sum gekk út, sigur Heri Andreasen, sum er tann, i› lei›ir verkætlanina vi› Jólaskipinum.

Hann sigur, at ætlan teirra frá fyrstan tí› var at finna skipi› og filma ta›. Bar so til at fáa eitthvørt upp av skipinum, var hetta bara ein frálíkur sí›uvinningur at fáa.

Og vinningin hava teir nú fingi›, fegnast hann um. Tó ver›ur fari› einafer› aftrat ni›ur aftur, á›renn givist ver›ur á hesum sinni. So er spenningurin mest um, hvørt teir finna klokkuna ella ikki.

Ein kassa hava teir sæ›, sum teir hava veri› serliga áhuga›ir í at fáa lati› upp. Tosa› hevur veri› um, hvørt ta› mundi vera ein pengakassi. men ta› heldur Heri Andrasen ikki, at ta› er. Hesin kassin líkist nógv teimum ló›urkassunum, teir hava sæ› á trolaranum Lincoln City, sum var› bumba›ur og sakk í Nólsoyarfir›i. Og tí ver›ur mett, at í hesum kassanum eisini er ló›ur, sigur hann.

Menn koma upp aftur ein fyri og annar eftir. Teir ver›a tiknir inn, og útger›in loyst av teimum. Tó sleppa teir ikki luftslangunum heilt, men ver›a liggjandi slættir eina gó›a løtu vi› lungaautomatunum tilsettum.

Men so er eisini tí› at fegnast um fongin. Og ta› gera teir veruliga. Ynskja hvør ø›rum tillukku og ver›a avmynda›ir.

Me›an bí›a› hevur veri› eftir, at kavararnir skuldu koma uppaftur, hevur fólki› á skipinum havt tí› at fingi› sær ein bita og hugt at umstø›unum annars. Skaddan á Havnartindi er bara sí›ka›, og nú eru gla›ur at síggja inn móti Vi›oynni.

Tosa› var› um, at ta› var kanska eitt sindur langligt at ganga her fyri einki. Rættari hev›i veri› at havt snøri› vi›. Men ta› gerst einki vi› ta› nú.

At kavingin í Fugloyarfir›i hevur áhuga millum fólk sást, tá komi› var› aftur at landi. So hvørt sum Dragaberg tók seg nor›ur gjøgnum Hvannasund, vaks mannamúgvan á bryggjuni í Nor›depli. Og tá lagt var› at, var bryggjan lo›in av fólki.

Tey vildu síggja og meta um, hvat ta› var, sum funni› var. Hvussu ta› sá út, og um ta› mundi hava naka› vir›i.

Teir eru júst komnir uppaftur